

# KUNNGERÐ

Tað verður her gjørt kunnugt, at fráboðaða fólkatingsvalið fer fram

**týsdagin tann 13. nov. 2007**
**í skúlaauluni við Gøtugjógv.**

**Atkvøðutíðin verður**
**frá kl. 9.00 og til kl. 20.00**

og verður tá valið endað, so skjótt eingin veljari kemur fram til valavgreiðslu, hóast áheitan.

**Brævatkøður**
Tey, ið av ymsum orsøkum heldur ynskja at velja við brævatkvøðu á fólkayvirlitinum (kommunuskrivstovuni) ella heima, verða biðin um at boða kommunuskrivstovuni frá í seinasta lagi fríggjadagin tann 9. nov. 2007 kl. 15. Seinasti rættstundis dagur fyri bræv- atkvøðugreiðslu er tó leygardagin tann 10. nov. 2007.

Brævatkvøður skulu vera valnevndini, har veljarin stendur á vallista, í hendi innan valið byrjar kl. 9 valdagin.

**Valkort**
Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna. Hesi verða send út við postinum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella sum fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt, men annars til og við valdagin.

Minnist vinarligast til at hava valkortið við á val.

Gøtu Kommuna

***29. okt. 2007***

# Bilførari søkist

Trailarakoyrikort og royndir innan trailaraflutning krevst.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Sp/f OCD**
FO-600 Saltangará
Tel. 477200

AS 2-15/2007

Det meddeles, at tvangsauktionen

**tirsdag den 13. november 2007 kl. 10.15**

over ejendommen

matr. nr: Tórshavn 686 a
Sámalsgøta 6

er aflyst

**FØROYA RÆTTUR**
den 29. oktober 2007

FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

# KUNNGERÐ

## um fólkatingsval í Fuglafjarðar kommunu

**Til veljarar til fólkatingsvalið 13. november 2007 í Fuglafjarðar kommunu.**

Vísandi til at fólkatingsval er útskrivað, so skal hervið verða kunngjørt, at atkvøðugreiðslan fer fram í býráðssalinum týsdagin tann 13. november 2007 fyri Fuglafjørð og Kambsdal og í Bønhúsinum á Hellunum fyri Hellurnar.

Atkvøtt verður millum kl. 09.00 og 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan støðg.

**Brævatkvøða:**
Veljarar, ið sambært vallógini hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð mánadag til fríggjadag millum **kl. 10.00 og 15.00** til og við fríggjadagin 09. november 2007. Tá seinasta freist fyri at greiða brævatkvøðu er leygardagin **10. november 2007**, so verður býráðsskrivstovan eisini opin nevnda dag millum kl. 13.00 og 17.00.

**Heimaval:**
Tey, sum vegna sjúku ikki kunnu koma á valstøðini, kunnu velja heima í seinasta lagi leygardagin 10. november 2007 við at venda sær til býráðsskrivstovuna telefon 737700 ella 737701 í seinasta lagi leygardagin tann **10. november 2007 kl. 15.00.**

**Valkort:**
Valkort verða send veljarunum í kommununi við postinum, og um persónar, sum heldur seg hava valrætt, ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at seta seg í samband við býráðsskrivstovuna á telefon 737700 skjótast.

**Veljarar hava valkortið við sær til valborðið.**

***Fuglafjørður, tann 29. oktober 2007***

# Bussur til sølu

Bussurin er ein Citroen Jumper, ið er góðkendur til 13 ferðandi + førara. Bussurin, sum er í besta standi, hevur aircondition, oljufýr, fartpilot og bakkisensor. Trygdarbelti til øll setur. Bert koyrt 49.000 km.

**Tlf. 51 54 55**

Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

# KUNNGERÐ

Tað verður her gjørt kunnugt, at fráboðaða fólkatingsvalið fer fram

**týsdagin tann 13. nov. 2007**
**á kommunuskrivstovuni í Leirvík**

**Atkvøðutíðin verður**

**frá kl. 900 og til kl. 2000**

og verður tá valið endað, so skjótt eingin veljari kemur fram til valavgreiðslu, hóast áheitan.

**Brævatkvøður**
Tey, ið av ymsum orsøkum heldur ynskja at velja við brævatkvøðu á fólkayvirlitinum (kommunuskrivstovuni) ella heima, verða biðin um at boða kommunuskrivstovuni frá **í seinasta lagi fríggjadagin tann 9. nov. 2007 kl. 12.00**. Seinasti rættstundis dagur fyri brævatkvøðugreiðslu er tó leygardagin tann 10. nov. 2007.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini, har veljarin stendur á vallista, í hendi innan valið byrjar kl. 9 valdagin.

**Valkort**
Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna. Hesi verða send út við postinum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella sum fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt, men annars til og við valdagin.

Mint verður á, at tygum eiga at hava valkortið við á val.

*Leirvík, tann 30. oktober 2007*

**Leirvíkar Kommuna**
*Kulibakki 15 · FO – 520 Leirvík*
*Tlf. 443006 · www.leirvik.fo*
*Teldupostur: leirvik@leirvik.fo*

# FÓLKATINGSVALIÐ

**fyri valstøðini í Runavíkar kommunu fer fram á hesum støðum Týsdagin 13. november 2007:**

Fyri valstaðið í Runavík í Ítróttarhøllini í Runavík fyri bygdirnar: Skipanes, Søldarfjørður, Lamba, Lambareiði, Glyvrar, Saltangará, Runavík, Rituvík og Æðuvík.

Fyri valstaðið á Skála fer fram í pensionistahúsinum á Skála fyri bygdina: Skála

Fyri valstaðið í Skálafirði í skúlanum í Skálafirði fyri bygdina: Skálafjørður

Fyri valstaðið í Oyndarfirði í skúlanum í Oyndarfirði fyri bygdina: Oyndarfjørður

Fyri valstaðið í Elduvík í skúlanum í Elduvík fyri bygdina: Elduvík

Fyri valstaðið Funningsfirði í skúlanum í Funningsfirði fyri bygdina: Funningsfjørður

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 09.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00 – ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

***Saltangará, 30. oktober 2007***

**Runavíkar Býráð**